


*Føroya Reiðarafelag hevur boðað frá, at felagið umhugsar at fáa regluna um, at 30% av føroysku veiðuni skulu seljast um uppboðssølu, avtikna. Tað fer uttan iva at minka um umsetningin hjá Fiskamarknaði Føroya, heldur nevndarformaðurin í Fiskmarknaðinum, sum tó einki hevur í móti, at reglan verður tikin av*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Vandi fyri fiskakartelli

**Verður reglan um, at 30 prosent skulu seljast um uppboðssølu, avtikin, verður vandi fyri, at ávís reiðarí fara at taka seg saman og gera við fiskin, sum teimum sjálvum líkar best. Tá kann gjøgnumskygni, sum nú er, hvørva, og vit koma aftur til, at marknaðurin verður stýrdur av nøkrum fáum skriviborðum, siga keldur í fiskivinnuni**

FISKAMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*

Verður tað soleiðis, at reiðarin púra einsamallur kann gera av, hvar veiðan verður seld, er vandi fyri, at vit koma aftur í tiðina, tá virki og skip hingu saman, og eingin kapping er um prís.

Soleiðis heldur ein kelda í fiskivinnuni, Sosialurin hevur tosað við, men sum ynskir at vera ónevnd. Vart verður gjørt við, at blaðið kennir samleikan hjá keldnuni.

Víst verður á, at tað, sum henda kann, er at reiðarar taka seg saman í sonevnd kartell, har teir púra einsamallir gera av, hvar fiskurin verður seldur, og hvør prísurin skal vera.

Eisini verður ført fram, at ein avtøka av 30% regluni fer at skaða Fiskamarknaðin, sum kanska fer at detta niðurfyri, og so eru vit aftur í gomlu skipanini.

Nevndarformaðurin í Fiskamarknaði Føroya óttast tó als ikki fyri, at so fer at verða.

Olaf Olsen, reiðari í Saltangará, er nevndarformaður i Fiskamarknaði Føroya, sum hevur uppboðssølu á Toftum.

Hann sigur, at Fiskamarknaðurin hevur ikki biðið um at fáa hesa regluna, og at hann er í móti »protectionismu« sum so. Men hann væntar kortini, at tað verður minni umsetningur hjá Fiskamaknaðinum. Men Fiskamarknaðurin fer altíð at verða, sigur hann, tí tað er avgjørt brúk fyri honum.

Olaf Olsen væntar ikki minni gjøgnumskygni í fiskivinnuni av teirri grund, at hendan reglan hvørvur.

– Karellavtalur kunnu nettupp gerast á eitt nú upsamarknaðinum sum er, sigur hann, tí upsi er ein fiskur, sum fáir keyparar eru til og tí ringur at selja á uppboðssølu.

Tá hildið verður fram fyri Olafi Olsen, um ikki júst tann avtalan, hann sjálvur hevur verið við til at gera við eina nýstovnaða fiska sølu fyri stuttum um at selja alla veiðuna gjøgnum hetta felagið, júst kann skiljast sum eitt slag av kartell avtalu, vísir hann tí aftur við teirri grundgeving, at fiskurin skal gjøgnum vanliga marknaðin kortini.

Málið, nevnt verður, snýr seg um, at eitt nýtt sølufelag hevur gjørt avtalu við trý reiðarí um at selja alla veiðuna hjá skipunum hjá hesum trimum reiðaríum gjøgnum hetta felagið.

Hinvegin vísir skrivarin í Ráfiskakeyparafelagnum, Agnar Jensen, á, at verður 30% reglan avtikin, kann tað enda við, at tey stóru virkini fara at keypa tað, tey hava brúk fyri, meðan tey smærru, sum júst hava notið gott av regluni, fara at detta burturímillum.

Men hann vísir eisini á, at málið er ikki nóg væl lýst enn til, at nakað kann sigast við vissu.

Enn er málið um at taka 30% regluna av, rættiliga ókent fyri flestu partar í vinnuni, so eingin fæst at siga nakað ítøkiligt um tað. Men greitt er, at tað órógvar summar partar, meðan aðrir halda, at tað fer onga ávirkan at hava.

Onkur kelda, Sosialurin hevur tosað við, metir, at tað kann enda við, at reiðaríni fara at seta prísin sum teimum lystir, og manningarnar í seinna enda ongan møguleika hava at fylgja við, hvat veruligi prísurin er, um fastar søluavtalur verða gjørdar við ávís feløg.

Óli Jacobsen, formaður i Føroya Fiskimannafelag, sigur, at tí fer Fiskimannafelagið ikki at loyva.

Men heldur ikki hann kennir kennir málið nóg væl til at vilja úttala seg alment um tað, men fer at kanna tað til botns, sigur hann.

Óli Jacobsen er eisini nevndarlimur í Fiskamarknaði Føroya, og hann fer at taka málið upp á komandi nevndarfundi.

Skrivarin hjá Ráfiskakeyparafelagnum heldur, at nú skulu vit bara taka tað róligt og ikki loypa framav, hóast ein príslækking er í løtuni.

Nógv fundarvirksemi var í ymsu pørtunum av vinnuni mikudagin, og okkurt er, sum bendir á, at uppskotið um at taka 30% regluna av, hevur órógvað summar partar av føroysku fiskivinnuni.



# Lági fiskaprísurin rekur skipini av landinum

**Trolbáturin, Búgvin av Toftum, er á veg niður til Scrabster við 40.000 pundum av toski.**
**- Vit vóna at fáa 3-4 krónur meira fyri kilo, enn um vit høvdu selt fiskin í Føroyum, sigur Theodor Poulsen.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Seinastu tíðina eru fiskaprísirnir lækkaðir nógv, og hetta hevur ført til, at skip eru farin at hyggja út um landoddarnar eftir, hvussu prísirnir eru har.

Trolbáturin, Búgvin av Toftum, er ein teirra, sum fyrr í vikuni setti kós móti Scrabster í Skotlandi. Teir høvdu fulla last, 40.000 pund, meginparturin toskur. Búgvin royndi einar 5–6 dagar; so teir hava havt góðan fiskiskap.

Tað er smápartafelagið, Nuna, sum eigur trolbátin, og ein av eigarunum er Theodor Poulsen.

– Meginparturin av veiðini hjá Búgvanum hendan túrin er toskur 3 og 4, og hetta skuldi verið bestur fiskur til fish & chips.

Theodor vísir á, at prísurin á toski í Føroyum er lágur í mun til, hvat hann hevur verið, og vóna teir at fáa einar 3–4 krónur meira fyri kilo av tí runda fiskinum í Skotlandi, enn teir høvdu fingið í Føroyum.

– Men tá ið tú selir á uppboðssølu, er ógjørligt at siga frammanundan, hvussu sølan verður, tí hetta veldst í fyrsta lagi um, hvussu marknaðarstøðan er júst tá. Vit hava tó vónir um eina hampiliga sølu í Scrabster, sigur hann.

## Fiskaprísurin

Theodor sigur, at versnaði fiskaprísurin í Føroyum í seinastuni er orsøkin til, at Búgvin ger eina roynd at fara uttanlands við hesi lastini.

– Nógvur fiskur hevur verið og er framvegis á føroyska marknaðinum, og fiskaprísurin er fallin hareftir.

Hann heldur tó ikki, at nøkur orsøk er til at stúra.

– Fiskaprísirnir hava annars verið so serstakliga góðir. Vit hava fingið 3-4 ferðir so nógv fyri fiskin, sum vit fingu fyri nøkrum árum síðan. At prísurin kavar, nú so nógvur fiskur er á marknaðinum, taka vit ikki so tungt. Vit vóna bara, at hann kemur uppaftur á nøkulunda tað støði, hann hevur verið í seinastuni.

Theodor Poulsen vísir annars á, at veðurlagið hevur verið ógvuliga skiftandi í hesum árinum; tí hevur meira at kalla bara verið roynandi í løtum.

– Men tað ger góðan mun, tá ið onkur góður túrur er ímillum sum í hesum førinum, nú Búgvin er fullur. Hetta er nógv tann besti túrurin hjá okkum í ár, sigur hann.

## Góðar sølur

Búgvin gjørdi annars ein sera góðan túr í desember; tá seldu teir fyri 535.000 krónur, og tað er næstbesti túrurin hjá teimum yvirhøvur. Besta túrin gjørdu teir fyri góðum tveimum árum síðan, tá ið teir seldu fyri 640.000 krónur. Í báðum førum høvdu teir eini 20.000-25.000 pund av havtasku umframt tosk, sum teir eisini fingu nógv fyri.

# Prísurin á rognum sera góður

**Ein útróðrarbátur, sum ger ein hampiligan túr, fær einar 35.000 krónur fyri rognini!**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað eru nógv viðurskifti í fiskivinnuni, vit ikki rættiliga hava stundir at geva okkum far um.

Nú trolbáturin, Búgvin, er á veg niður til Scrabster við fullari last av toski, vænta teir sær 10 krónur minni fyri kilo av rognum, enn um teir seldu rognini í Føroyum.

Rognaprísurin í Føroyum er nevniliga rættiliga góður og nógv betri enn í Skotlandi.

Theodor Poulsen, sum eigur Búgvan saman við tveimum øðrum, sigur, at prísurin fyri toskarogn í Føroyum er einar 36-36 krónur fyri kilo, meðan hann liggur um 25 krónur fyri kilo í Skotlandi. Prísmunurin er tískil einar 10 krónur.

## Gera mun

Theodor dugir ikki rættiliga at siga, hvussu stórur prosentpartur av toskinum, rognini eru, men hann metir, at tey telja eini 10%.

– Vártúrarnar hava vit javnan eitt tons av toskarognum, og tað gevur okkum einar 35.000 krónur aftrat søluni av sjálvum fiskinum. So, hetta er rættiliga munagott.

Hann vísir á, at prísurin á rognum byrjaði so spakuliga at fara uppeftir í fjør ella fyrraári, og í dag er hann rættiliga góður og hevur stóran týdning fyri samlaðu søluna.

– Vit taka altíð toskarognini hesa tíðina av árinum, tí tey eru nógv dýrari enn sjálvur fiskurin og hála tískil samlaðu søluna uppeftir, sigur hann.

Theodor Poulsen vísir á, at í fjør fingu bátar eisini góðan prís fyri silini, sum hann heldur enda í Japan.

– Vit hava so ongantíð tikið sil, sigur hann.

Besta tíðin at taka toskarogn er í februar og mars.

Sosialurin & Internet Sosialurin

ÓKEYPIS



Nú Sosialurin fyllir 75 ár í ár, so ber tað til at gerast haldari av Sosialinum ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum. Samstundis loyva vit okkum at senda tykkum eitt uppkrav fyri apríl-ársfjórðing.




Sosialurin

Navn:
Bústaður:
Post nr., bygd, býur:
Telefon
e-mail:
Undirskrift: